# Bólturin liggur nú hjá suðuroyingum



*Tað eru kommunurnar í Suðuroy, sum eiga útspælið og tí liggur alt í teirra hondum, sigur Hans pauli Strøm, landsstýrismaður*

**Landsstýrið fer nú at senda kommunum í Suðuroy upplegg um at viðgera spurningin um at byggja røktarheim**

RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Bera kommunurnar í Suðuroy skjótt at, kann eitt røktaheim standa liðugt í Suðuroy um hálvt triðja ár.

Tað heldur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum.

Nú løgtingið hevur endaliga avgjørt at byggja skúladepil í Hovi, fer landsstýrið aftur at reisa spurningin um at byggja røktarheim í Suðuroy.

Tað liggur í kortunum, at røktarheimið skal byggjast vesturi á Eiðinum í Vági, sum annars varð ætlað til miðnámsskúlan.

Í næstum fer landsstýrið sostatt at senda kommununum í oynni skriv í sambandi við røkarheimið.

– Í tí skrivinum vísa vit á, at ein tørvskanning vísir, at tað er tørvur á røktarheimsplásum til eini 35 fólk í Suðuroy, sigur Hans Pauli Strøm, landsstyrismaður.

Í skrivinum til kommunurnar, fer landsstýrið eisini at vísa á, hvørjari tíðarætlan kann leggast fyri eitt røktarheim í Vági.

– Verður arbeitt skjótt, kann eitt røktarheim standa liðugt um hálvttriðja ár, sigur Hans Pauli Strøm.

Somuleiðis fer landsstýrið at greina út, hvussu ein slík bygging kann fíggjast.

Meginreglan er, at landið betalir umleið helvtina av eini slíkari bygging, ella í mesta lagi 500.000 krónur fyri hvørt búfólk.

– Tað meginregluna fara vit ikki at bróta. Men vit hava samstundis gjørt greitt, at í sambandi við eitt røktarheim í Suðuroy, eru vit sinnað at finna eitt serligt fíggingarmynstur so at kommunurnar hava møguleika at bera sín part, hóast tær eru illa fyri.

Verður røktarheimið bygt í Vági, hevur tað eisini verið nevnt, at tað, sum vágbingar longu hevur goldið í sambandi við stykkið til miðnámsskúlan vesturi á Eiðinum, kann verða ein partur av fíggingini hjá Vágs Kommunu til røktarheimið.

### Bólturin liggur í Suðuroy

Hans Pauli Strøm leggur tí dent á, at nú liggur bólturin hjá kommununum í Suðuroy.

– Tað eru kommunurnar, sum skulu taka stig til at byggja røktarheim. Ætlanin hjá landsstýrinum er eitt tilboð til kommunurnar í Suðuroy og tær eiga nú at seta seg saman at viðgera um tær taka av tilboðnum og byggja røktarheimið eftir serliga lagaligum treytum, sigur hann.

Hann sigur, at gera kommunurnar av at byggja røktarheimið, verða samráðingar við Landsstýrið um, hvussu kommunurnar kunnu fíggja sín part. Men táð skal eisini tosast um, hvussu stovnurin skal síggja út, hvussu stórur hann skal vera, skulu serlig pláss verða til minnisveik og sinnisveik, skulu umlættingarpláss verða o.s.fr.

Aðrir møguleikar eru eisini kommunurnar heldur vilja byggja pláss til sinnisveik aðrastaðni í oynni.

– Hesar samráðingar við Landsstýrið koma so at vísa, hvat kommunurnar eru sinnaðar til og førar fyri at byggja í Vági, sigur landsstýrismaðurin.

Nú hevur Tvøroyrar Býráð gjørt løgtinginum greitt, at Tvøroyrar Kommuna fer ikki at betala til eitt røktarheim í Vági?

– Tað er ein spurningur, sum Tvøroyrar Kommuna má gera upp við seg sjálva. Men tað er púra greitt, at tað eru kommunurnar, sum skulu taka stig til eitt røktarheim. Vil Tvøroyrar Kommuna ikki vera við, er støðan ein onnur. Og tað er ongin vissa fyri, at semja fæst um at byggja røktarheim í Suðuroy, tí tað eru kommunurnar, sum skulu taka stigið. Tað er ikki landið, sum byggir røktarheimið, men Landsstýrið vil fegið betala sín part og finna eina lagaliga fígging, so at kommunurnar kunnu átaka sær sín part.

### Ikki til kommunurnar fyribils

Eftir ætlan skuldi eldraøkið verða lagt undir kommunurnar 1. januar í ár.

– Men tað hava vit steðgað fyribils og í løtuni liggur onki í kortunum um at leggja eldraøkið undir kommunurnar, sigur Hans Pauli Strøm.

Hans Pauli Strøm sigur, at tað er eisini rættiliga stórur munur á, hvussu tey ymsu økini í Føroyum eru fyri til eldrarøkt, har summi økið eru heilt afturútsigld og onnureru væl fyri. Verður eldraøkið lagt undir kommunurnar nú, hevði tað verðið sera stórur munur á teimum ymsu kommununum.

– Men verður eldraøkið lagt til kommunurnar, er tað eyðsæð, at tað verður lættari hjá teimum kommununum, har eldraøkið er útbygt, sigur landsstýrismaðurin.

# Sambandsflokkurin komin á mál

**Flokkurin leggur nú nýskipanaruppskotið í rúgvuna av avgreiddum málum**

RÍKISRÆTTARLIG STØÐA

*Áki bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú eiga vit at brúka orkuna til at stýra okkara landi trygt inn í framtíðina, heldur enn at keglast um fortíðina, sigur Kaj Leo Johannesen*

Sambandsflokkurin hevur í fleiri ár arbeitt við einum nýskipanaruppskoti, sum skuldi staðfesta ríkisrættarligu støðu Føroya í danska ríkinum.

Men nú leggur flokkurin uppskotið í rúgvuna av avgreiddum málum.

Tað ger flokkurin, nú Løgtingið hevur samtykt yvirtøkulógirnar og lógirnar um uttanríkispolitisku heimildirnar.

Nýskipanaruppskotið vísti, hvussu Føroyar kundu verða eitt sjálvstýrandi land í ríkisfelagsskapinum. Men nú løgtingið hevur avgreitt yvirtøkulógirnar og uttanríkispolitsku heimildirnar, er nýskipanaruppskotið at kalla framt í verki og tí verður taðnú lagt tilviks sum avgreitt, sigur Sambandsflokkurin.

– Tað er gott at vita, at vit langt um leingi eru komin har til, at vit hava fingið loyst hetta málið, og tað frøir meg, at endaliga loysnin liggur so tætt sum tað ger uppat tí uppskoti, sum vit komu við fyri skjótt seks árum síðan", sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum í tíðindaskrivi.

Hann vísir á, at orsøkin til, at vit eru komin so langt, er góður samstarvsandi ímillum samgonguflokkarnar og positivur samráðingarvilji ímillum Føroyar og Danmark.

– Viðurskiftini við Danmark eru nú dagførd eftir ynskjunum hjá Sambandsflokkinum og hjá einum breiðum meiriluta av Føroya fólki. Tá ið vit í næstum fáa eina nýggja stjórnarskipan, eru vit komin á mál í hesi syftu. Vit eiga tí at hyggja frameftir og brúka orkuna til at stýra okkara landi trygt inn í framtíðina, heldur enn at keglast um fortíðina, sigur formaður sambandsfloksins.

# Umleggingarnar á føðideildini seinkaðar

**Tær verða ikki settar í verk nú, sum ætlað, men seinni í ár ístaðin**

FØÐIDEILDIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Illa umstríddu umleggingar á føðideildini verða ikki settar í verk beint nú, sum ætlað.

Ístaðin verða tær settar í verk seinni í ár.

Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrahúsinum, sigur, at tað eru ymisk viðurskifti, sum bera í sær, at føðideildin ikki verður umskipað enn.

Men seinkingin hevur als onki at gera við stríðið sum, sum tók seg upp við sjúkrarøktarfrøðingarnar um umleggingina.

– Umleggingin er staðfest og hon verður sett í verk og tað er av heilt natúrligum orsøkum, at vit ikki kunnu byrja at arbeiða eftir nýggju vaktarskipanini enn, sigur hann.

Hann sigur, at endamálið hevur alla tíðina verið at fyrireika umleggingina væl og virðiliga, áðrenn hon varð sett í vera fyri at tryggja, at dygdin á deildini verður varðveitt.

Men nú er summarið í hondum og tí verður bíðað við at seta umleggingina í verk til summerferiurnar eru avgreiddar.

Hann sigur, at í løtuni verður arbeitt við at gera eina ætlan fyri, hvussu umleggingin skal setast í verk.

Tað er eitt arbeiðið sum er ígongd í løtuni.

Setta, trístreingjaða leiðslan á føðideildini, er í ferð við at fyrireika uppleggið til, hvussu umleggingin skal setast í verk og síðani skulu eisini teir ymsu fakbólkarnir at verða við í fyrireikingini.

Umleggingin ber í høvuðsheitum við sær, at ljósmøður skulu nú taka lut í arbeiðnum inni á sjálvari føðideildini. Tær ganga annars á vakt, men verða bara tilkallaðar, tá ið kvinna skal eiga. Við at lata tær arbeiða á føðideildini, metir leiðslan, at hon fær størri nyttu burturúr arbeiðsmegini.

Tað merkir aftur, at nakrir sjúkrarøktarfrøðingar missa starvið á føðideildini, men ætlanin er at teir fáa starv aðrastaðni á Landssjúkrahúsinum.

Sjúkrarøktarfrøðingarnir hava mótmælt, tí tær meta, at røkt hoyrir undir teirra øki og at dygdin fer at fella, skulu aðrir fakbólkar taka sær av røktini.

Tær góðtaka heldur ikki, at ljósmóður skal vera leiðari fyri sjúkrarøktini á føðideildini.

### Beint eftir summarfrítíðina

Eitt, sum skal gerast púra greitt, nú umleggingin verður fyrireikað, er, hvørji ábyrgdarøki hvør fakbólkur hevur.

Men Poul Geert Hansen metir, at tað verður beint eftir summarfrítíðina, at farið verður yvir til nýggju vaktarskipanina.

Tann trístreingjaða leiðslan á føðideildini er ovasti leiðarin, sum er ljósmóður og so tveir fak±ligir millumleiðarar, ein fyri ljósmøðraskipanina og ein fyri sjúkrarøktina.

Tá ið eitt ár er farið, skulu hesi størvini lýsast leys. Tað liggur fast, at tveir fakligir millumleiðarar skulu vera, ein fyri ljósmøðraskipanina og ein fyri sjúkrarøktina. Honvegin kann ovasti leiðarin verða antin ljósmóður, ella sjúkrarøktarfrøðingur, ella ein, sum hevur báðar útbúgvingarnar.

# Mátti svara

Í Sosialinum í gjár umrøddu vit málið, har Jana H. Dalsgaard, forkvinna í felagnum føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar, ringdi til Fimmaran í Útvarpinum, har hon umrøddi stríðið um føðideildina.

Vit skrivaðu, at tað var við beráddum huga, at hon ringdi tril Fimmaran.

Jana. H.Dalsgaard ger vart við, at hetta skal als ikki misskiljast so, at hon bara bíðaði eftir møguleikanum at draga kjakið um føðideildina upp í málið, har fakfeløgini lýstu verkfall at mótmæla at landsstýrið brúkar fútarættin at steðga einari arbeiðsósemju.

Tað gjørdi hon ikki. Men tað var heldur óumhugsað, at ringdi. Umstøðurnar gjørdu, at hon átt ringja til Fimmaran at siga sína hugsan, tí frammanundan var mótparturin sloppin at siga sína søgu um føðideildina og tað kundi ikki standa ósvarað.

**-áki-**